# VEGLEIÐING UM YVIRLIT YVIR VIÐGERÐIR

**November 2020**

**1. útgáva**

Dátueftirlitið

# Innihald

1. Yvirlit yvir viðgerðir ....3
1.1 Endamál ....3
1.2 Hvør skal gera yvirlit ....3
1.3 Formkrøv....4
1.3.1 Skal yvirlitið sendast til Dátueftirlitið?....4
2. Hvørjar upplýsingar skulu vera í yvirlitinum? ....5
2.1 Yvirlit hjá dátuábyrgdara ....5
2.1.1 Navn og samskiftisupplýsingar ....5
2.1.2 Endamálið við viðgerðini....5
2.1.3 Bólkar av skrásettum og sløg av persónupplýsingum....6
2.1.4 Bólkar av móttakarum, sum persónsupplýsingar verða víðarigivnar til ....8
2.1.5 Flutningur av upplýsingum til útland, triðjaland ella millumtjóðafelagsskap ...9
2.1.6 Tíðarfreistir fyri at strika upplýsingar .... 10
2.1.7 Ein almenn lýsing av trygdartiltøkunum .... 11
2.2 Yvirlit hjá dátuviðgera.... 12
2.2.1 Navn og samskiftisupplýsingar .... 12
2.2.2 Sløg av viðgerð av persónupplýsingum .... 13
2.2.3 Flutningur av upplýsingum til útland, triðjaland ella millumtjóðafelagsskap 13
2.2.4 Ein almenn lýsing av trygdartiltøkunum .... 13
3. Undantak frá kravinum um yvirlit yvir viðgerðir.... 15
3.1. Mynd, sum lýsir undantak .... 16
4. Frágreiðing um undantak.... 17
4.1 Hvør kann brúka undantakið? .... 17
4.2 Hvussu verður starvsfólkatalið gjørt upp?.... 17
4.3 Tríggjar týðandi avmarkingar frá undantakinum frá kravinum um yvirlit .... 17
5. Samanumtøka.... 20

# Innleiðsla

Í dátuverndarlógini er krav um, at dátuábyrgdarar og dátuviðgerar skulu gera yvirlit yvir teirra viðgerðir av persónsupplýsingum.

Kravið um yvirlit merkir, at tú sum viðger persónupplýsingar, altíð eigur at gera tær greitt og hava yvirblikk yvir, hvørjar persónupplýsingar tú viðger og hví. Yvirlitið skal hjálpa tær at lúka krøvini, sum dátuverndarlógin annars setur í sambandi við viðgerð av persónupplýsingum.

Yvirlitið er fyrst og fremst eitt amboð, sum tú sum dátuábyrgdari og dátuviðgeri kann nýta fyri at tryggja tær, at reglurnar í dátuverndarlógini verða hildnar. Yvirlitið skal tó eisini vera eitt týdningarmikið amboð hjá Dátueftirlitinum at nýta, tá Dátueftirlitið kannar um dátuverndarlógin verður hildin. Yvirlitið skal tí eftir umbøn latast Dátueftirlitinum.

Henda vegleiðing er skrivað til tín, sum ert dátuábyrgdari ella dátuviðgeri og tí skal gera eitt yvirlit yvir viðgerðir. Vegleiðingin skal hjálpa tær áleiðis. Saman við vegleiðingini er eisini ein skabelón, sum tú kanst brúka.

# 1. Yvirlit yvir viðgerðir

Kravið um yvirlit yvir viðgerðir er ásett í § 44 dátuverndarlógini, sum ásetur, at dátuábyrgdarar skulu gera yvirlit yvir allar viðgerðir, sum teir hava ábyrgd av. Harumframt skulu dátuviðgerar gera yvirlit yvir øll sløg av viðgerðum, sum fer fram fyri dátuábyrgdaran.

## 1.1 Endamál

Endamálið við kravinum um yvirlit er, at tryggja, at dátuábyrgdarin (og dátuviðgerin) veit, hvørjar upplýsingar verða viðgjørdar og til hvørji endamál. Eisini kann yvirlitið brúkast til at vísa á, at reglurnar í dátuverndarlógini verða hildnar.

Eitt yvirlit er við til at geva dátuábyrgdaranum (og dátuviðgeranum) eitt yvirblikk yvir tær upplýsingar, sum verða viðgjørdar, og kann eisini nýtast, sum eitt týdningarmikið amboð í arbeiðnum hjá Dátueftirlitinum.

Ein **dátuábyrgdari** er:

Ein likamligur ella løgfrøðiligur persónur, ein almennur myndugleiki, ein stovnur ella ein onnur eind, sum eina ella saman við øðrum ger av, til hvørji endamál og við hvørjum hjálpitólum persónupplýsingar kunnu viðgerast.

Ein **dátuviðgeri** er:

Ein likamligur ella løgfrøðiligur persónur, ein almennur myndugleiki, ein stovnur ella ein onnur eind, sum viðger persónupplýsingar dátuábyrgdarans vegna.

## 1.2 Hvør skal gera yvirlit

Dátuábyrgdarar og dátuviðgerar skulu gera yvirlit.

Dátuábyrgdarar og dátuviðgerar, sum ikki eru staðsettir í Føroyum, skulu í ávísum førum tilnevna eitt umboð í Føroyum. Um dátuábyrgdari ella dátuviðgeri hava eitt umboð í Føroyum, skal umboðið eisini hava yvirlit.

Í serstøkum førum slepst undan kravinum at gera yvirlit yvir viðgerðir. Hesar undantaksstøður verða tiknar upp í punkti 4 í hesi vegleiðing.

## 1.3 Formkrøv

Yvirlit yvir viðgerðir skal gerast skriftliga og elektroniskt. Hetta merkir, at tú ikki kann hava eitt yvirlit í einum fysiskum skjali ella í minninum.

Tað verða ikki sett krøv til sjálvt sniðið á yvirlitinum. Tú kanst gera yvirlitið í einum skema ella í einum vanligum tekstviðgerðarforriti. Saman við hesi vegleiðing er eitt dømi um, hvussu eitt yvirlit kann síggja út.

### 1.3.1 Skal yvirlitið sendast til Dátueftirlitið?

Nei.

Ert tú dátuábyrgdari ella dátuviðgeri (ella umboð) skalt tú ikki sjálvboðin senda yvirlit til Dátueftirlitið. Um Dátueftirlitið biður um yvirlitið t.d. í sambandi við eftirlit, skalt tú senda eftirlitinum tað.

# 2. Hvørjar upplýsingar skulu vera í yvirlitinum?

## 2.1 Yvirlit hjá dátuábyrgdara

Dátuábyrgdarin skal gera yvirlit yvir allar viðgerðir, sum hann hevur ábyrgd av.

Tað er umráðandi at geva sær fær um, at kravið um yvirlit yvir viðgerðir hjá dátuábyrgdaranum fevnir breitt, og fevnir um *allar viðgerðir* uttan mun til hvat slag av upplýsingum ella viðgerðum talan er um.

§ 44, stk. 1 í dátuverndarlógini ásetur, hvørjar upplýsingar eitt yvirlit yvir viðgerðir hjá dátuábyrgdarum í minsta lagi skal innihalda. Hesar upplýsingar verða gjøgnumgingnar niðanfyri.

Tað er upp til dátuábyrgdaran at gera av, um yvirlitið skal innihalda fleiri upplýsingar.

Um dátuábyrgdarin hevur eitt umboð í Føroyum, tí dátuábyrgdarin ikki sjálvur er staðsettur í Føroyum, skal umboðið hava yvirlitið.

### 2.1.1 Navn og samskiftisupplýsingar

Navn á dátuábyrgdara og samskiftisupplýsingar skulu vera við.

Um tað er viðkomandi skal eisini navn og samskiftisupplýsingar hjá felags dátuábyrgdara, umboði hjá dátuábyrgdara og dátuverndarfólki vera við.

### 2.1.2 Endamálið við viðgerðini

Í yvirlitinum skalt tú sum dátuábyrgdari greiða frá, hvat endamálið við viðgerðini er. Tað merkir, at øll endamál, sum tú hevur ábyrgdina av, skulu vera við.

Í ávísum førum kanst tú savna fleiri viðgerðir í einum yvirliti. Tað er ein fyritreyt fyri hesum, at tær viðgerðir, sum tú vilt samla undir einum, kunnu lýsast undir einum samlaðum, logiskum og samanhangandi endamáli. Tað kann serliga vera viðkomandi fyri endamál, sum innanhýsis hanga saman, tí talan er um somu uppgávu ella sama lógargrundarlag fyri viðgerðini.

Ein privatur dátuábyrgdari kann tí gera yvirlit yvir ymiskar viðgerðir við sama endamáli, t.d. yvirlit í starvsfólkamálum, yvirlit viðvíkjandi kundum, yvirlit viðvíkjandi varskógvaraskipan o.s.fr.

Kravið um, at endamálið skal lýsast hongur saman við meginregluni um endamálsavmarking í § 7. Meginreglan hevur við sær, at tú sum dátuábyrgdari longu áðrenn viðgerðin fer í gongd, skalt gera tær greitt, hvat endamálið við viðgerðini er. Hetta endamál skal verða nágreiðiliga tilskilað og sakligt. At tú skalt skjalfesta endamálið merkir, at tú skalt festa tær metingar, tú skalt gera tær, niður á blað.

**Dømi 1**
Ein kommuna viðger persónupplýsingar í sambandi við ymsar kommunalar veitingar til borgarar. Endamálini við viðgerðini eru ymisk, t.d. at gjalda veitingar til borgarar, ráðgeving og vegleiðing, stuðul til veikar borgarar.

Hesi endamál eru tó væl egnað at verða lýst undir einum samlaðum, logiskum og samanhangandi endamáli, og tí kann eitt yvirlit gerast. Endamálið kann lýsast sum: "Viðgerð av persónupplýsingum í sambandi við handfaring av skyldum hjá kommununi í sambandi við sosialar veitingar".

**Dømi 2**
Ein privat fyritøka kann eisini savna fleiri endamál í eitt yvirlit, um endamálini kunnu lýsast undir einum samlaðum, logiskum og samanhangandi endamáli. Viðgerð av persónupplýsingum í sambandi við barsil, feriu og lønargjaldingar kann t.d. verða lýst undir endamálinum "starvsfólkaumsiting" í yvirlitinum.

### 2.1.3 Bólkar av skrásettum og sløg av persónupplýsingum

Yvirlitið skal hava eina lýsing av bólkunum av skrásettum og sløgunum av persónupplýsingum, sum viðgerast um bólkarnar av skrásettum.

***Bólkar av skrásettum***

Skrásett eru teir persónar, sum persónupplýsingarnar eru um. Lýsingin av "bólkum av skrásettum" hongur neyvt saman við viðgerðini, sum tú gert. At tú skalt lýsa bólkar av skrásettum merkir, at tú kanst bólka tey skrásettu á ein hátt, sum er logiskur, og at tær ikki nýtist at gera yvirlit fyri hvønn skrásetta.

**Dømi um bólkar av skrásettum**

- Sjúklingar
- Avvarðandi
- Limir
- Umsøkjarar
- Børn og ung undir 18 ár
- Handilssambond, t.d. kundar, veitarar og samstarvspartar
- Starvsfólk og fyrrverandi starvsfólk
- Børn

***Sløg av persónupplýsingum***

Fyri at lúka kravið um at lýsa sløg av persónupplýsingum, skal tí í minsta lagi lýsa, um persónupplýsingarnar, sum tú viðger eru vanligar persónupplýsingar (§ 8) ella viðkvæmar persónupplýsingar (§ 11). Eisini eigur tú at lýsa, um tú viðger persónupplýsingar um revsiverd viðurskifti (§ 13) ella upplýsingar um p-talið (§ 16).

Um tú viðger viðkvæmar persónupplýsingar, skalt tú nágreina, hvørjar viðkvæmar persónupplýsingar, tú viðger, t.d. upplýsing um heilsustøðu ella politiska sannføring.

**Hetta eru sløgini av viðkvomum persónupplýsingum (úttømandi)**

- Heilsuupplýsingar
- Upplýsingar um kynslig viðurskifti
- Upplýsingar um húðarlit, ættarslag og etniskan uppruna
- Upplýsing um politiska, átrúnaðarliga ella heimspekiliga sannføring
- Upplýsing um yrkisfelagsligt tilknýti
- Ílegudátur
- Biometriskar dátur
- Upplýsing um revsiverd viðurskifti, munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti

Afturat hesum, sum tú í minsta lagi skal lýsa, kanst tú velja at gera tað enn greiðari, hvørjar upplýsingar talan er um. Hetta kann verða ein fyrimunur fyri bæði teg og onnur.

**Dømi um nágreining av sløgum av persónupplýsingum**

- Upplýsingar úr landsfólkayvirlitinum
- Revsiváttan
- Kontonummar
- Eftirlønarviðurskifti
- Feria og onnur frávera
- Fakligir førleikar
- Lønarviðurskifti
- Frávera vegna sjúku
- Sosialir trupulleikar
- Familjuviðurskifti
- Samskiftisupplýsingar
- Upplýsingar um fíggjarlig viðurskifti

### 2.1.4 Bólkar av móttakarum, sum persónsupplýsingar verða víðarigivnar til

Um tú víðarigevur ella ætlar at víðarigeva persónupplýsingar, skalt tú lýsa bólkarnar av móttakarum í yvirlitinum. Hetta fevnir eisini møguligar móttakarar uttanfyri Føroyar.

Tú skalt sostatt gera greitt, *um* persónupplýsingar verða givnar víðari, og í so fall til hvønn. Um tú víðarigevur ella ætlar at víðarigeva persónupplýsingar skalt tú eisini, umframt at upplýsa bólkar av móttakarum, upplýsa, hvørjar persónupplýsingar talan er um, og hvørjar bólkar av skrásettum upplýsingarnar eru um.

**Dømi um bólkar av móttakarum**

- **(Aðrir) almennir myndugleikar, t.d. TAKS**
  Víðarigevingin fevnir um hesar upplýsingar um starvsfólk:
  - Samleikaupplýsingar, undir hesum navn og bústaður
  - Lønarviðurskifti
  - P-tal
- **Eftirlønarfeløg**
  Víðarigevingin fevnir um hesar upplýsingar um starvsfólk:
  - Samleikaupplýsingar, undir hesum navn og bústaður
  - Starv og starvstaður
  - Lønarviðurskifti
  - P-tal
- **Aðrir næmingar og foreldur**
  Víðarigevingin fevnir um hesar upplýsingar um næmingar:
  - Samleikaupplýsingar, undir hesum navn, bústaður og telefonnumar
  - Upplýsingar um møguligar ósemjur millum næmingar o.o.
- **Almennan myndugleika í Danmark**
  Víðarigevingin fevnir um hesar upplýsingar um umsøkjarar:
  - Samleikaupplýsingar, undir hesum navn og bústaður
  - P-tal
  - Fíggjarlig viðurskifti

### 2.1.5 Flutningur av upplýsingum til útland, triðjaland ella millumtjóðafelagsskap

Um tú flytir upplýsingar til eitt útland, triðjaland ella millumtjóðafelagsskap skalt tú skriva hetta í yvirlitið.

Eitt útland eru øll ES og EBS lond.

Eitt triðjaland eru øll lond, sum ikki eru limir í ES ella EBS.

Umframt at lýsa, at upplýsingar verða fluttar til eitt útland o.s.fr., skalt tú eisini greiða frá, hvør heimildin fyri flutninginum er. Heimildin kann vera ein av ásetingunum í kapitli 6 í dátuverndarlógini. Tað skal eisini við í yvirlitið hvørji sløg av persónupplýsingum eru um ymsu bólkarnar av skrásettum.

**Dømi um flutning av upplýsingum til útland, triðjaland ella millumtjóðafelagsskap**

- Persónupplýsingar verða fluttar til Danmarkar. Sambært § 59 í dátuverndarlógini krevur hetta ikki serligt loyvi.
- Almennan myndugleika í Danmark
  Víðarigevingin fevnir um hesar upplýsingar um umsøkjarar:
    - Samleikaupplýsingar, undir hesum navn og bústaður
    - P-tal
    - Fíggjarlig viðurskifti

### 2.1.6 Tíðarfreistir fyri at strika upplýsingar

Um tað er møguligt skal tú lýsa tær ætlaðu tíðarfreistirnar fyri striking av ymisku sløgunum av persónupplýsingum, sum tú viðger. Tað er sostatt ikki eitt krav, at tú skalt áseta eina strikingarfreist fyri viðgerðina sum so.

Tað er umráðandi at geva sær fær um, at tað er eitt alment krav í dátuverndarlógini, at tú ikki goymir upplýsingar á ein hátt, sum gevur tær møguleika at eyðmerkja tey skrásettu í longri tíðarskeið enn neyðugt við atliti til endamáli við viðgerðini (meginreglan um goymsluavmarking). Tað merkir, at tú leypandi skal meta um, um kravið um at hava eitt sakligt endamál við viðgerðini er lokið, ella um upplýsingarnar skulu strikast. Um tú hevur eina almenna freist fyri striking (t.d. árliga), hevur tú ikki skyldu til at meta um upplýsingarnar so hvørt.

At tú skalt áseta tíðarfreistir fyri striking er sostatt eitt krav um, at tú skjalprógvar metingar, sum tú hevur skyldu at gera tær

**Dømi um tíðarfreist fyri striking**

**Gransking og hagtalsviðgerð**
Upplýsingar um borgarar og starvsfólk, sum verða viðgjørdar í sambandi við gransking og hagtalsviðgerð, verða strikaðar, tá granskingarverkætlanin er liðug ella hagtølini gjørd.

**Kundar og viðskiftafólk**
Upplýsingar um kundar og viðskiftafólk, sum eru viðgjørdar í sambandi við keyp av tænastum, verða strikaðar, tá kundin biður um tað og í seinasta lagi 5 ár eftir tænastan er veitt.

### 2.1.7 Ein almenn lýsing av trygdartiltøkunum

Yvirlitið skal hava eina almenna lýsing av tøkniligu og bygnaðarligu trygdartiltøkunum, sum eru sett í verk í sambandi við viðgerðina. Orsøkin er, at tú sum dátuábyrgdari hevur skyldu at seta hóskandi tiltøk í verk, sum tryggja, at viðgerðin er í samsvari við dátuverndarlógina, og at tú skalt kunna vísa á, at so er.

Í vegleiðingini um viðgerðartrygd, sum er tøk á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, kanst tú lesa meira um, hvussu tú livir upp til kravið um at seta hóskandi tiltøk í verk.

**Dømi um bygnaðarlig tiltøk**

- Reglur um tagnarskyldu
- Tilnevning av dátuverndarfólki
- Innanhýsis reglur um bygnaðarlig viðurskifti og fysiska trygd, t.d. trygdarskipan, avmarking ella eftirlit við atgongd, góðkenningarskipanir
- Upplæring og eftirútbúgving av starvsfólki.

**Dømi um tøknilig tiltøk**

- Virusverja
- Brongling av øllum samskifti
- Firewall
- Antispam og –phising filtur
- Atgongd hjá brúkara er tengt at loyniorði, sum er minst 8 tekn.
- Tiltøk so til ber at kanna hvør hevur viðgjørt persónupplýsingar (logging)
- Atgongd grundað á fleiri loyniorð
- Flokka upplýsingarnar
- Uppbýtt net og avbyrging
- Skráseting av avvístari atgongd
- Backup av øllum skipanum

## 2.2 Yvirlit hjá dátuviðgera

Sambært dátuverndarlógini, skal dátuviðgerin eisini hava yvirlit. Tað merkir, at bæði dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu hava yvirlit yvir somu viðgerðir.

§ 44, stk. 2 í dátuverndarlógini ásetur, hvørjar upplýsingar eitt yvirlit yvir viðgerðir hjá dátuviðgeranum í minsta lagi skal innihalda. Hesar upplýsingar vera gjøgnumgingnar niðanfyri.

Yvirlitið hjá dátuviðgeranum skal ikki innihalda eins nógvar upplýsingar og tí er skyldan eitt sindur linari enn skyldan hjá dátuábyrgdaranum.

Um dátuviðgerin hevur eitt umboð í Føroyum, tí dátuviðgerin ikki sjálvur er staðsettur í Føroyum, skal umboðið hava yvirlitið.

### 2.2.1 Navn og samskiftisupplýsingar

Yvirlitið skal hava navn og samskiftisupplýsingar hjá dátuviðgera og harafturat upplýsing um fyri hvønn dátuábyrgdara, persónupplýsingarnar verða viðgjørdar.

Um tað er viðkomandi skulu eisini navn og samskiftisupplýsingar umboði hjá dátuábyrgdara, dátuviðgera og dátuverndarfólki vera við.

### 2.2.2 Sløg av viðgerð av persónupplýsingum

Sum dátuviðgeri skalt tú hava yvirlit yvir øll sløg av viðgerðum, sum tú gert fyri hvønn einstaka dátuábyrgdara. Hetta merkir, at tú í størri mun enn dátuábyrgdarin kann bólka viðgerðirnar í færri yvirlit.

**Dømi um standardloysnir**
Um tú sum dátuviðgeri bjóðar eina standardloysn (t.d. hýsing) til fleiri dátuábyrgdarar, kanst tú hava eitt yvirlit, sum fevnir um allar dátuábyrgdararnar. Tó skal dátuviðgerin tryggja sær, at krøvini til innihald í yvirlitinum annars eru lokin.

### 2.2.3 Flutningur av upplýsingum til útland, triðjaland ella millumtjóðafelagsskap

Um tú flytir upplýsingarnar hjá dátuábyrgdaranum til eitt útland, triðjaland ella millumtjóðafelagsskap skalt tú skriva hetta í yvirlitið.

Eitt útland eru øll ES og EBS lond.

Eitt triðjaland eru øll lond, sum ikki eru limir í ES ella EBS.

Umframt at lýsa, at upplýsingar verða fluttar til eitt útland o.s.fr., skalt tú eisini greiða frá, hvør heimildin fyri flutninginum er. Heimildin kann vera ein av ásetingunum í kapitli 6 í dátuverndarlógini.

### 2.2.4 Ein almenn lýsing av trygdartiltøkunum

Yvirlitið skal hava eina almenna lýsing av tøkniligu og bygnaðarligu trygdartiltøkunum, sum eru sett í verk. Orsøkin til, at tú sum dátuviðgeri saman við dátuábyrgdaranum hevur skyldu at seta hóskandi tiltøk í verk, sum tryggja, at viðgerðin livir upp til krøvini í dátuverndarlógini.

Í vegleiðingini um viðgerðartrygd, sum er tøk á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, kanst tú lesa meira um, hvussu tú livir upp til kravið um at seta hóskandi tiltøk í verk. Sí eisini omanfyri undir yvirliti hjá dátuábyrgdaranum dømi um, hvørji trygdartiltøk talan kann vera um.

# 3. Undantak frá kravinum um yvirlit yvir viðgerðir

Fyritøkur, sum hava hava færri enn 250 starvsfólk eru í útgangsstøðinum ikki fevndar av kravinum um yvirlit. Hetta merkir, at flestu føroysku fyritøkurnar í útgangsstøðinum eru undantiknar kravinum. Tað er tó ógvuliga umráðandi at leggja merki til, at undantakið ikki er so breitt, sum tað kann sýnast.

Viðgerðir, sum fyritøkur við færri enn 250 fólkum gera, eru sostatt fevndar av kravinum um yvirlit allíkavæl, um ein av hesum avmarkingunum í undantakinum ger seg galdandi. Hetta er um viðgerðin:

- sannlíkt hevur við sær ein váða fyri rættindi hjá teimum skrásettu,
- ikki bara er viðhvørt, ella
- fevnir um viðkvæmar persónupplýsingar sbrt. § 11, stk. 1.

Tað er tískil umráðandi, at fyritøkur, sum hava færri enn 250 starvsfólk, meta um viðgerðirnar sum tær gera, fyri at gera av, um viðgerðin hevur ein váða við sær, er oftari enn viðhvørt ella fevnir um viðkvæmar persónupplýsingar. Um so er, skal eitt yvirlit gerast.

Dømi um viðgerð, sum er fevnd av undantakinum, er skráseting í eini kundaskipan, sum ikki er bundin í internetið, við tí endamálið at skriva út garanti. Navn, bústaður og telefonnummar verður skrásett. Tá garantiið er latið kundanum, verða persónupplýsingarnar strikaðar aftur. Slík viðgerð hevur ikki við sær ein váða, er bara viðhvørt og fevnir ikki um viðkvæmar persónupplýsingar.

## 3.1. Mynd, sum lýsir undantak



# 4. Frágreiðing um undantak

## 4.1 Hvør kann brúka undantakið?

§ 45 í dátuverndarlógini, sum snýr seg um undantøk frá kravinum um yvirlit, vísir til "fyritøkur". Undir hetta koma fyritøkur og eisini felagsskapir o.a. privatar eindir, sum virka í privata geiranum.

Almennir myndugleikar kunnu hinvegin ikki brúka undantakið. Almennir myndugleikar, bæði landsmyndugleikar og kommunalir myndugleikar, eru altíð fevndir av kravinum um yvirlit.

## 4.2 Hvussu verður starvsfólkatalið gjørt upp?

Fyritøkur, sum hava fleiri enn 250 starvsfólk, eru altíð fevndar av kravinum um yvirlit, og kunnu ikki brúka undantakið. Fyritøkur, sum hava færri enn 250 starvsfólk, eru í útgangsstøðinum undantiknar frá kravinum um yvirlit.

Talið av starvsfólkum verður roknað út frá, hvør er í føstum starvið í fyritøkini. Tað er miðaltalið av fólkum í føstum fulltíðarstarvi í einum roknskaparári, sum er avgerandi, og sum kann vera undir ella yvir 250.

## 4.3 Tríggjar týðandi avmarkingar frá undantakinum frá kravinum um yvirlit

Avgerðandi fyri um viðgerðir eru fevndar av kravinum um yvirlit, eru um viðgerðirnar eru fevndar av avmarkingunum í undantakinum ella ikki. Legg til merkis, at um avmarkingin er galdandi fyri eina ávísa viðgerð, so er tað tann viðgerðin, sum tú skalt gera yvirlit yvir. Tær nýtist ikki at gera yvirlit yvir allar viðgerðirnar, tí at ein av tínum viðgerðum ella eitt slag av viðgerð er fevnt av avmarkingini.

- **Avmarking nr. 1:** Viðgerðir, sum sannlíkt hava við sær ein váða fyri rættindi hjá teimum skrásettu, eru ikki undantiknar. Avgerandi fyri hesa metingina er, hvør váði er við viðgerðini fyri tann skrásetta.

**Váði**
Tá tú metir um váðan av eini viðgerð, skalt tú meta um, hvørjar avleiðingar ein viðgerð kann hava fyri rættindini hjá skrásetta. Um tað er sannlíkt, at tað er ein váði fyri skrásetta, skalt tú gera eitt yvirlit. Tað er ikki eitt krav, at váðin skal verða stórur.

Ein váði fyri skrásetta kann t.d. vera at óviðkomandi fáa atgongd til upplýsingarnar, at skipanin verður hacka (hacking), at tú missir krypteringslykil o.s.fr. Hetta kann hava við sær negativar avleiðingar fyri skrásetta, t.d. samleikastuldur, peningaligan miss, sosialar avleiðingar o.s.fr.

- **Avmarking nr. 2:** Viðgerðin er ikki bara viðhvørt. Eitt dømi um eina viðgerð, sum ikki bara er viðhvørt, er viðgerð av starvsfólkaupplýsingum. Sjálvt um viðgerð í slíkum málum ikki er reglulig, so er hon oftari enn bara viðhvørt.

**Dømi: Limagjald**
Eitt limafelag krevur limagjald frá limunum fýra ferðir um árið. Fyri at kunna krevja limagjald hevur felagið brúk fyri at viðgera upplýsingar um limirnar (t.d. navn og bústað). Hendan viðgerðin er ikki bara viðhvørt, sjálvt um kravið um limagjald bara verður viðgjørt eina ferð hvønn ársfjórðing. Orsøkin er, at felagið goymir persónupplýsingarnar eisini í tíðini ímillum innkrevjingina. At goyma upplýsingarnar á henda hátt, er "viðgerð" av persónupplýsingum sambært dátuverndarlógini, og viðgerðin er tískil ikki bara við hvørt, men er reglulig og áhaldandi.

- **Avmarking nr. 3:** Viðgerðin fevnir um viðkvæmar persónupplýsingar sbrt. § 11, stk. 1.

**Viðkvæmar persónsupplýsingar**
Viðkvæmar persónupplýsingar eru upplýsingar um húðarlit, ættarslag, etniskan uppruna, politiska, átrúnaðarliga ella heimspekiliga sannføring, yrkisfelagsligt tilknýti, ílegudátur, biometriskar dátur fyri eintýtt at eyðmerkja ein persón, heilsuupplýsingar, upplýsingar um kynslig viðurskifti, revsiverd viðurskifti, munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti. Um tú viðger slíkar upplýsingar, skalt tú gera eitt yvirlit yvir viðgerðina.

Um tú eftir eina ítøkiliga meting kemur til ta niðurstøðu, at tann viðgerðin, sum tú gert er fevnd av einum av hesum avmarkingum, skalt tú hava eitt yvirlit. Hetta er sjálvt um tú hevur færri enn 250 starvsfólk.

# 5. Samanumtøka

Tá tú hevur lisið hesa vegleiðing, eigur tú at kenna yvirskipaðu meginreglurnar, sum gera seg galdandi í mun til kravið um yvirlit.

- Bæði dátuábyrgdarar, dátuviðgerar og teirra umboð í Føroyum skulu hava yvirlit yvir viðgerðir.
- Yvirlitini skulu vera skrivlig, undir hesum elektronisk og skulu eftir umbøn latast Dátueftirlitinum.
- Dátuábyrgdarar skulu hava yvirlit, sum innihalda:
    - navn og samskiftisupplýsingar hjá dátuábyrgdaranum
    - endamálið við viðgerðini
    - eina lýsing av bólkum av skrásettum og sløgum av persónupplýsingum
    - bólkar av móttakarum, her undir móttakarum í útlondum, triðjalondum ella millumtjóðafelagsskapum
    - upplýsing um flutning av persónupplýsingum til eitt útland, eitt triðjaland ella ein millumtjóðafelagsskap
    - ætlaðu tíðarfreistirnar fyri striking av ymisku sløgunum av upplýsingum
    - eina almenna lýsing av trygdartiltøkunum, sum eru nevnd í § 46, stk. 1
- Dátuviðgerar skulu hava yvirlit, sum innihalda:
    - navn og samskiftisupplýsingar hjá dátuviðgera og fyri hvønn dátuábyrgdara, persónupplýsingarnar verða viðgjørdar
    - sløg av viðgerð av persónupplýsingum
    - upplýsing um flutning av persónupplýsingum til eitt útland, eitt triðjaland ella ein millumtjóðafelagsskap
    - eina almenna lýsing av trygdartiltøkunum, sum eru nevnd í § 46, stk. 1
- Um tú hevur eina fyritøku o.a., sum hevur færri enn 250 starvsfólk, kanst tú meta um, um viðgerðirnar hjá tær eru undantiknar frá kravinum um yvirlit. Gev gætur, at undantakið hevur eitt smalt virkisøki.

**Vegleiðing**

©2020 Dátueftirlitið

Endurprent við kelduávísing er lóglig.

Givið út:
Dátueftirlitið
Reyngøta 33
100 Tórshavn
Tlf: 309100
dat@dat.fo
dat.fo

Dátueftirlitið